**Álit**

**í**

**løgtingsmáli nr. 170/2018: Uppskot til samtyktar um at seta donsku royndarskipanina við cannabisheilivági í gildi í Føroyum**

Jenis av Rana, løgtingsmaður, hevur lagt málið fram 12. mars 2019, og eftir 1. viðgerð 27. mars 2019 er tað beint Trivnaðarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt máli á fundi 11., 23. og 30. apríl 2019.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við løgmann, Aksel V. Johannesen, landsstýrismannin í heilsu- og innlendismálum, Sirið Stenberg, saman við landsapotekaranum, og landsstýrismannin í heilsu- og innlendismálum, Sirið Stenberg, saman við varastjóranum fyri Sjúkrahúsverk Føroya og Bjarna á Steig, yvirlækna á medisinska deplinum á Landssjúkrahúsinum.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í tríggjar minnilutar.

**Ein minniluti** (Jenis av Rana, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur og Kaj Leo Holm Johannesen) tekur undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Ein annar minniluti** (Katrin Kallsberg, Sonja Jógvansdóttir og Óluva Klettskarð) hevur hesar viðmerkingar:

Fyri knapt tveimum árum síðan varð almenn vegleiðing gjørd í Føroyum um medisinskt cannabis, og læknar kunnaðir um hetta. Sum vegleiðingin vísti, so kundu allir læknar í Føroyum útskriva magistrelt framleidda cannabisolju. (At nakað er framleitt magistrelt merkir, at tað er framleitt á apoteki til einstaka sjúklingin eftir tørvi).

Vegleiðingin til læknarnar fylgir vegleiðingini, sum er galdandi í Danmark, eitt nú eru ávísir sjúklingabólkar nevndir í vegleiðingini. Allir læknar kunnu útskriva medisinskt cannabis til sjúklingar við pínu. Til sjúklingar við multiplari sklerosu ella mønuskaða eiga neurologar at skriva heilivágin út. Til sjúklingar við vamli av kemoterapi eiga hæmatologar, onkologar ella læknar á palliativari eind at skriva heilivágin út.

Hesa vegleiðing hava læknar í heilsuverkinum í Føroyum tikið til sín, tí tað sæst aftur á hagtølunum, at tað er rættiliga fitt av cannabisheilivági útskrivaður í Føroyum síðan á heysti 2017. Sum nevndin hevur fingið upplýst, so fingu 68 borgarar í Føroyum cannabisheilivág frá serlæknum og kommunulæknum í 2018. Tað hava verið ymisk sløg av cannabisheilivági, sum hava verið tøk at útskriva, men í mun til Danmark, so hevur heilivágurin, ið er komin afturat vøruskránni í Danmark í sambandi við 4 ára royndarskipanina við cannabis, ikki verið tøkur hjá føroyskum læknum at útskriva. Í løtuni er talan um 6 ymisk vørusløg, sum eru komin í vøruskránna í Danmark í.s.v. royndarskipanina.

Í Føroyum vísa royndirnar við medisinskum cannabis, at tað eru serlæknar í pínuviðgerð, sum hava flestu sjúklingarnar, umframt nakrar fáar kommunulæknar og nakrar aðrar læknar sum útskriva cannabisheilivágin. Í høvuðsheitum eru flestu reseptirnar frá serlæknum í heilsuverkinum.

Fyri einum ári síðan viðgjørdi Løgtingið spurningin, um farast skuldi undir at fyrireika at gerast partur av donsku royndarskipanini, um annar leistur skuldi brúkast, ella um frægast var at halda seg uttanfyri royndarskipanina. Løgtingið metti tá, at skilabest var at bíða og fylgja gongdini við mediskinskum cannabisi í Føroyum, at síggja ávegis royndir, hvussu heilsuverkið hevur tikið hetta til sín og at hyggja at royndunum í Danmark av royndarskipanini av medisinskum cannabis.

Um hugt verður at royndunum í Danmark kunnu vit nú staðfesta, at í Danmark er tað framvegis flestu av teimum, ið fáa cannabisheilivág, sum fáa magistrelt framleiddan heilivág, ið er gjørdur serskilt á apoteki, men royndarskipanin verður eisini brúkt.

Í donsku royndarskipanini av cannabis vóru í 2018, 1384 borgarar, ið fingu heilivág eftir hesi skipan. Tó at hetta kann ljóða avmarkað, so er hetta munandi fleiri, enn politiska skipanin hevði væntað, tá ið skipanin varð sett i verk.

Ávegis royndirnar av hesi skipan sigast vera góðar fyri ávísar sjúklingar og sjúklingabólkar, meðan tað at kalla onga ávirkan hevur ella hevur neiliga ávirkan á summar sjúklingar, sum tí gevast aftur. Skipanin við hesum slagi av medisinskum cannabis er tó ikki brúkt nóg leingi til, at vit kunnu síggja granskingarúrslit enn; tískil eru einans ávegis metingar.

Higartil eru 6 ymiskir tilbúningar (præparat) komnir í vøruskránna hjá donskum læknum at útskriva samsvarandi royndarskipanini, men fleiri sigast vera ávegis. Royndirnar í Danmark eru eisini, at tað oftast eru serlæknar, ið útskriva fyrstu reseptina eftir royndarskipanini, og at tað í høvuðsheitum eru sjúklingar við neuropatiskari pínu (nervapínu), ið fáa henda heilivág. Tað sæst, at tað er mest cannabisheilivágur útskrivaður í Sælandsøkinum, og at tað enn eru lutfalsliga fáir læknar, ið útskriva medisinskt cannabis.

Til ber ikki at siga, hvussu nógvir føroyingar, ið møguliga fáa útskrivað heilivág í Danmark eftir royndarskipanini, tí hesi eru ikki skrásett serskilt. Føroyskir sjúklingar hava møguleika at fáa medisinskt cannabis eftir royndarskipanini útskrivað í Danmark og taka hetta við sær til Føroyar. Tó bert fyri 3 mánaðir i senn. Skulu sjúklingarnir halda áfram við viðgerðini er neyðugt at broyta cannabisheilivágin til magistrellan cannabisheilivág, ella at fara aftur til Danmarkar og fáa nýggja resept í Danmark.

Nú knapt hálvt annað ár er farið, síðan royndarskipanin varð sett í verk í Danmark, ber til at staðfesta, at higartil hava royndirnar ikki verið neiligar, og at tað tykist sum, at fleiri og fleiri í heilsuverkinum taka hetta við í metingina av, hvussu ávísar sjúkur og t.d. pína kunnu viðgerðast.

Havast skal í huga, at fyri nógvar sjúklingabólkar verður cannabisheilivágur ikki brúktur, fyrr enn øll møgulig onnur góðkend sløg av heilivági eru brúkt, sum eisini fyri nógvar sjúklingar hava umfatandi hjáárin, og at cannabisheilivágur eisini verður brúktur saman við øðrum heilivági fyri at fáa ynskta virknaðin.

Tað er eisini gjørd ávís gransking í Føroyum av royndum av at nýta cannabisheilivág sum part av eini palliativari viðgerð. Sum tað varð upplýst í Trivnaðarnevndini, fingu 15 palliativir sjúklingar cannabisheilivág í 2017. Av hesum fingu 11 sjúklingar gagn av heiliváginum við at summi høvdu minnið vaml, betri vælveru og nakað av pínulinna. Eisini varð upplýst, at fyri hesar sjúklingar tyktist sum, at viðgerð við cannabis saman við morfin tyktist effektiv. 4 sjúklingar góvust við

cannabisheiliváginum av hjáárinum og ringum smakki. Nevndin fekk eisini upplýst, at alt ov lítil gransking er gjørd á økinum, tískil mugu fleiri royndir fáast, áðrenn til ber at gera meira umfatandi vegleiðingar o.s.fr.

Nevndin hevur fingið upplýst, at í heimshøpi, so er enn ov lítil góðkend medisinsk gransking gjørd á økinum um virknaðin, tó at arbeitt verður við hesum. Vert er at hava í huga, at fleiri og fleiri lond og statir hava seinastu árini innført skipanir við medisinskum cannabis, og at fleiri eru ávegis.

Fegnast kann um, at læknar í heilsuverkinum hava tikið vegleiðingina um medisinskt cannabis til sín og brúkt hetta sum ein av mongum møguleikum í sini viðgerð av sjúklingum. Sum tølini vísa, so eru lutfalsliga fleiri sjúklingar í Føroyum sum í 2018 fingu útskrivaðan cannabis heilivág enn í Danmark, hóast royndarskipanin ikki er sett í verk í Føroyum.

Mett verður tað vera rætt at taka eitt stig víðari, og geva læknum møguleika at brúka tey heilivágssløgini av cannabis, sum sett eru í verk í samband við donsku royndarskipanina. Sum nevndin hevur fingið upplýst, so er ikki neyðgt við lógarbroyting til at fáa hesar 6 tilbúningar á listan, tí lógarverkið í Føroyum heimilar, at allur heilivágur og heilivágsutbúnaður verður settur í verk, sum eru við í donsku vøruskráunum yvir heilivág. Tað týdningarmesta er, at sjúklingar hava atgongd til so góða viðgerð sum gjørligt, og at hetta er undir skipaðum viðurskiftum, soleiðis at læknar kenna seg tryggar í at brúka møguleikan við medisinskum cannabis. Hetta tykist hava rigga, tí verður mælt til at halda fast í leistin við magistrella heiliváginum og brúka henda fyri heilivágin, ið danir nýta í royndarskipanini.

Landsstýrismaðurin hevur upplýst, at av tí at politiska landslagið í Føroyum ynskir, at sjúklingar í Føroyum skulu hava møguleika at fáa somu viðgerð við cannabisheilivági, sum í Danmark, hevur hon heitt á apoteksverkið um at fáa heilivágin við á listan, sum kann útskrivast í Føroyum. Hetta er at fegnast um, og eisini er gott, at landsstýrismaðurin hevur tikið spurningin um cannabisheilivág í tí rætta álvaranum, og hevur fingið gjørt vegleiðingar um nýtslu av cannabisheilivági, og hvussu tilskot kann veitast.

Minnilutin væntar tískil og heitir eisini á landsstýrið um frameftir at fylgja við, hvør heilivágur møguliga kemur afturat í.s.v. donsku royndarskipanina av cannabis, og at fáa yvirlitini í Føroyum dagførd samsvarandi, so at hesin eisini er tøkur í Føroyum, og at dagføra vegleiðingar og geva møguleika at søkja um tilskot, eins og tað er í dag viðvíkjandi magistrella cannabisheiliváginum. Sum upplýst er, so er neyvt eftirlit við hesum, eins og øðrum heilivági, og at ongin lækni er forðaður í ella tvingaður til at nýta henda møguleika til teir í vegleiðing lýstu sjúklingabólkarnar.

Minnilutin hevði fegin viljað, at tað varð gjørd ein frágreiðing um nýtslu av cannabisheilivági í Føroyum og royndir av hesum.

Tá ið royndarskipanin í Danmark varð sett í verk, varð nakað av peningi settur av til gransking í sonevndu satspuljuni. Í Føroyum er møguleiki at søkja um fígging til heilsugransking og upplýsing úr Sjúkrakassagrunninum, sum Granskingarráðið umsitur. Eru fólk í heilsuverkinum ella felagsskapir áhugaðir at gera smærri granskingarverkætlanir um nýtsluna av cannabisheilivági, er hetta møguligt, um verkætlanin annars lýkur krøvini.

Minnilutin heldur, at kunnu føroyskir sjúklingar fáa hjálp ella linna av cannabisheilivági, skal hesin sjálvsagt vera tøkur, og nevndin er spent at frætta nærri um royndirnar av cannabisheiliváginum, og vónar, at hesin kann hjálpa og linna hjá sjúklingum, ið annars eru illa plágaðir av sjúku og/ella pínu.

Hesin minnilutin setir fram soljóðandi

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

"Løgtingið heitir á landsstýrið um at tryggja, at allur cannabisheilivágur, sum er tøkur í Danmark, gerst partur av heilivágslistanum hjá apoteksverkinum í Føroyum, umframt at møguleiki skal vera at søkja um tilskot til heilivágin, og leggja fram frágreiðing um nýtsluna av cannabisheilivági í Føroyum og royndirnar av hesum."

Við hesum broytingum tekur hesin minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Ein triði minniluti** (Jónleif Johannesen) tekur støðu í tingsalinum.

**Trivnaðarnevndin, 1. mai 2019**

| | | |
|---|---|---|
| Jónleif Johannesen<br>formaður | Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur<br>næstformaður | |
| Óluva Klettskarð | Jenis av Rana | Katrin Kallsberg |
| Sonja Jógvansdóttir | Kaj Leo Holm Johannesen | |